effo deildin

FÓTBÓLTUR

ÍTRÓTTUR

VIT TIPPA

Pætur E. Jensen tippar...

1	X	2
1	X	2
1	X	2
1	X	2
1	X	2

Fótbóltsserfrøðingarnir hjá Miðlahúsinum tippa umførini í Effodeildini

***1:** Heimasigur **X:** Javnleikur **2:** Útisigur*

Mynd: Álvur Haraldsen

stóð seg væl, og hann hevur verið væl upplagdur í venjingunum, sigur Oddbjørn Joensen.

AB venjarin roknar allar tólv dystirnar, sum eru eftir av hesum kappingarárinum, at vera lykladystir:

– Málið hjá okkum er at sleppa undan niðurflytingarvandanum. Tað verður tætt ímóti EB/Streymi. Um tað eydnast okkum at vinna, so kann talan skjótt verða um heilt aðra seinnu hálvu, enn stigatalvan leggur upp til, men tað skal undir øllum umstøðum arbeiðast nógv og miðvíst.

Fokusera á FM

B36 - KÍ

DAGFINN FORNÁ

ÓLAVSØKUDAG KL. 16.00

Støðutalvan sigur, at tað hevur gingið sum eftir ánni hjá B36 í landskappingini. Í steypakappingini varð árstalsfelagið varpað burtur í fyrsta umfari, og í europeisku kappingini var talan um vónbrot – serliga á heimavølli tá ið møguleikar vóru at vinna, men tá ið tað endaði við 2-1 tapi ímóti norðurírska Linfield. Í Norðurírlandi endaði tað 1-1.

Tí hevur framvegis ósigraða B36 bara fokus á at vinna 10. FM heitið, og fyritreytirnar eru uppaftur betri nú, enn tær hava verið. Rógvi Poulsen, Adrian Cieslewicz og Odmar Færø styrkja um liðið og breiðka um hópin. B36 venjarin Sámal Erik Hentze undirstrikar tó, at eingin eigur sjálvskrivað pláss á liðnum:

– Í útgangsstøðuni er upplagt, at teir, sum hava borið okkum fram til oddasessin, fáa kjansin, tí teir hava allir spælt væl. Í Norðurírlandi var Odmar Færø í miðverjuni í staðin fyri Andrias Eriksen. Tað var ikki, tí Andrias var avsettur, men tí hann var skaddur í lærkrikanum. Jákup á Borg er komin fyri við møguleikanum, at tað skal bera til, sigur KÍ venjarin Eyðun Klakstein.

HB hugsar ikki um FM

HB - B68

PETUR REINERT

ÓLAVSØKUAFTAN KL. 18.00

Føroyameistararnir og undan kappingarbyrjan FM favorittarnir í HB eru sjey stig og lakari málmun aftanfyri B36. Møguleikin at vinna gull og skreyt er fyrst og fremst í steypafinaluni ímóti Víkingi.

– B36 hevur staðið seg ógvuliga væl, og tað verður torført at fáa fatur á B36. Hjá okkum ræður um at taka ein dyst í senn. Europeiska luttøkan hevur heilt víst styrkt um liðið hjá okkum. Tað hevur stóran týdning sosialt, og tað er hugaligt at spæla ímóti so góðum liði, sum vit gjørdu í seinna innleiðandi umfarinum, sigur HB veteranurin Andrew av Fløtum.

– Tað hevur verið og er smeitur hjá okkum, at Gunnar Haraldsen, Christian R. Mouritsen og Símun Samuelsen framvegis eru skaddir, og nú er Heini Vatnsdal leikbannaður, staðfestir Andrew av Fløtum, sum rósar Jóan Símuni Edmundsson og Poul Ingason fyri at vera falnir so væl til á HB liðnum.

Ólavsøkuaftan vitja toftamenn í Gundadali. Tølini siga, at HB er stórfavorittur. B68 er á niðurflytingarplássi, og tað eru fjúrtan ár síðani, at B68 vann fulla úrtøku í Gundadali ímóti HB. Í 2000 var úrslitið 4-3 til B68. Einastu spælararnir, sum vóru við ta ferðina, og sum eisini vera við ólavsøkuaftan, eru Andrew av Fløtum og Fróði Benjaminsen, sum fyri fjúrtan árum síðani varð skiftur inn á B68 liðið, tá ið tað restaði ein hálvur tími. Nú er hann HB liðformaður.

Síðani 2000 hava toftamenn bara ein ferð vunnið stig ímóti HB í Havn. Tað var í 2011, tá úrslitið var 3-3.

Hjá B68 verður nýtt fólk í báðum endum: Hans Jørgensen verður málverji, og Ibrahim Camara verður fremsti maður.

Effodeildin støðan

NR.	LIÐ	DYSTIR	VUNNI	JAVNT	TAPT	+ MÁL	- MÁL	+/-	STIG
1	B36	15	11	4	0	35	14	+21	37
2	HB	15	8	6	1	31	14	+17	30
3	Víkingur	15	7	5	3	29	16	+13	26
4	EB/Streymur	15	6	4	5	26	20	+6	22
5	NSÍ	15	6	3	6	31	19	+12	21
6	KÍ	15	6	2	7	26	26	0	20
7	ÍF	15	4	5	6	23	30	-7	17
8	AB	15	3	4	8	16	36	-20	13
9	B68	15	2	3	10	15	34	-19	9
10	Skála	15	1	6	8	9	32	-23	9

Dagsskráin er tann sama

ÍF - Skála

PÁLL AUGUSTINUSSEN

SUNNUDAGIN KL. 15.00

Felags fyri ÍF og Skála er, at liðini í summarsteðginum hava fingið styrk. Í síðsta umfarinum undan summarsteðginum eydnaðist tað Skála og nýggja venjaranum, Paula Poulsen, at vinna 2-0 á heimavølli ímóti KÍ. Hetta var fyrsti sigurin í ár. Tá vísti Pauli G. Hansen, hvussu týdningarmikil hann er á miðvøllinum. Síðani eru álopsspælarin Ahmed Keita og framrættaði Høgni Midjord komnir aftrat. Skála er niðast, og harvið er dagsskráin at skava stig saman, so tað kann sleppast upp um strikuna.

Tá ið ÍF vitjaði á Skála 11. mai, varð úrslitið 2-2. Heimaliðið var tætt við at vinna fyrsta sigurin, men Bartal Eliasen javnaði tríggjar minuttir undan leikloki.

– Tað var strevið á Skála, og soleiðis rokna vit eisini við, at tað verður, tá ið Skála kemur at vitja okkum. Clayton Soares er komin aftur úr Brasil, og hann sær út at vera væl fyri. Tað er smeitur, at Karl Løkin er leikbannaður. Hetta er fyrsta leikbannið hjá okkum í ár. Fleiri eru á markinum, og tí er tað gott, at vit hava fingið fleiri aftrat, sigur Albert Ellefsen, ÍF venjarin, sum sipar til Boga Løkin, Andrias Poulsen og Jógvan Isaksen.

Nýtt gamalt í Runavík

NSÍ - Víkingur

MIKUDAGIN 30. JULI



Blaðframleiðslan er løgd soleiðis til rættis, at hesar reglur eru skrivaðar, áðrenn fyrsta bríkslið var í Tromsø, har Víkingur hóskvøldið spældi í Europa liguni. Í skránni er oyggjauppgerðin við Løkin millum NSÍ og Víking ásett at vera mikudagin 30. juli. Um víkingarnir framdu bragdið at spæla seg víðari, so verður hesin dysturin útsettur, tí triðja umfar í europeisku liguni er á skránni longu 31. juli.

Grannauppgerðin millum NSÍ og Víking er altíð áhugaverd, og hon verður ikki minni áhugaverd hesa ferð. Eftir fínu europeisku avrikin skal væl trimmaða Víkinga liðið við Andreas Lava Olsen og Súna Olsen royna seg aftur í landskappingini, har tað í síðsta umfarinum undan summarsteðginum endaði málleyst á heimavølli ímóti HB. Og hjá NSÍ er dagsskráin at vinna á øðrum enn trimum teimum niðastu. Síðani Christian Høgni Jacobsen og Pól Jóhannus Justinussen eru komnir aftrat, eiga fyritreytirnar fyri hesum at verða vornar betri.

joannes@sosialurin.fo

ÍF

Leikbann: Karl Løkin

KÍ

Leikbann: Johan Jacobsen
og Henry Heinesen
Ivasamir: Jonas Flindt Rasmussen
og Rodrigo Silva
Ikki við: Álvur F. Christiansen
(Burturstaddur) og Atli Danielsen (Givin)

NSÍ

Allir mans tøkir

SKÁLA

Skaddur: Poul N. Poulsen
(Slitið krossbandið, úti 1 ár)

VÍKINGUR

Skaddur: Dánial Pauli Lervig
(Fótliði, byrjaður at venja aftur)